# Ástøðingar




Eitt er á orði annað á borði



## Monika Stauss Joensen

*Góð ráð í sambandi við jólini:*

Tak 12 mánaðir, reinsa teir væl og virðiliga fyri klandur, stríð, kappingarhug og stúran.

Sker so hvønn mánað í 30 ella í 31 pettir, so tað er nóg mikið av pørtum til eitt heilt ár.

Set hvønn dag saman, við einum parti av arbeiði og tveimum pørtum av gleði og góðsku.

Píska nú tríggjar súpiskeiðir av friði og eina skeið av langmóði, mildleika og spakføri, og blanda so alt varisliga saman.

Hell nú ríkiligt av kærleika omaná alt.

Til seinast skal pyntast við dropum av uppmerksemi og borðreiðast skal dagliga við blíðskapi og einum vælsmakkandi kaffimunni í trúgv.

## Í MORGIN




Fyrrapartin lot til andøvsgul av vestri, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind og avfall, sum fráliður regn. Hitin kemur upp í 7 til 10 stig

## FRÍGGJADAGIN




Fyrrapartin andøvsgul upp í ein strúk av vestri og regn. Seinnapartin upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

## LEYGARDAGIN




Gul til stívt andøvsgul av vestri og útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul mest av útnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. í landnyrðing úr Føroyum grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1014 hPa. vestan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðiung.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið norðanfyri Ísland fer í landsynning og hitabrúgvin vestan fyri Føroyar fer eystureftir og hevur lýggjari luft við sær.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 142 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 30. november | Mánin næstur jørðini |
| 5. desember | Tendring |
| 13. desember | Fyrra kvarter |
| | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 8. des | 08:28 | 20:53 | 07:28 | 19:53 | 07:43 | 20:08 | 10:28 | 22:53 | 11:28 | 23:53 |
| 9. des | 09:16 | 21:39 | 08:16 | 20:39 | 08:31 | 20:54 | 11:16 | 23:39 | - | 12:16 |
| 10. des | 10:00 | 22:22 | 09:00 | 21:22 | 09:15 | 21:37 | - | 12:00 | 00:39 | 13:00 |
| 11. des | 10:43 | 23:05 | 09:43 | 22:05 | 09:58 | 22:20 | 00:22 | 12:43 | 01:22 | 13:43 |
| 12. des | 11:37 | 23:45 | 10:37 | 22:45 | 10:52 | 23:00 | 01:05 | 13:37 | 02:05 | 14:37 |

| | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 8. des | 06:43 | 19:08 | 05:43 | 18:08 | 08:43 | 21:08 | 09:43 | 22:08 | 08:13 | 20:38 | 09:28 | 21:53 |
| 9. des | 07:31 | 19:54 | 06:31 | 18:54 | 09:31 | 21:54 | 10:31 | 22:54 | 09:01 | 21:24 | 10:16 | 22:39 |
| 10. des | 08:15 | 20:37 | 07:15 | 19:37 | 10:15 | 22:37 | 11:15 | 23:37 | 09:45 | 22:07 | 11:00 | 23:22 |
| 11. des | 08:58 | 21:20 | 07:58 | 20:20 | 10:58 | 23:20 | 11:58 | - | 10:28 | 22:50 | 11:43 | - |
| 12. des | 09:52 | 22:00 | 08:52 | 21:00 | 11:52 | - | 00:20 | 12:52 | 11:22 | 23:30 | 00:05 | 12:37 |